# S MEISTARI








*Andres Iniesta skorar einasta málið í eykatíðuni finaluni móti Hollandi, og sendir spaniólar á gull-kós*

*Casillas og spaniólar við HM steypinum*

Mynd: Polfoto

Arjen Robben púra leysan, men spanski málverjin, Iker Casillas, tordi at bíða so mikið leingi, at tað gjørdist ov knapt hjá Robben.



Í staðin fekk Casillas fótin á, so bólturin smeyg sær beint fram við stongini.

Og bara átta minuttir eftir hetta hevði Spania ein møguleika, ið var minst líka stórur, tá David Villa brádliga stóð púra leysur í hollendska brotsteiginum, men onkursvegna fekk John Heitinga blokerað skotinum, so skotið hjá Villa fór uppum. Og so stóð Robben aftur fyri tørni, tá hann fekk ein møguleika aftur, ið líktist hansara fyrra. Men hesa ferð var hann meira kroystur, so tí gjørdist tað ikki trupult hjá Casillas at verja fyri.

Umframt hetta komu so størru og smærru kjansirnir til Spania síðstu 10 minuttir av umdystinum, tá teir vóru í meiriluta á vøllinum, men kortini ikki megnaðu at umseta møguleikarnar til mál.

Sigursmálið kom ikki, fyrr enn Andrés Iniesta tók ímóti góðu frí-spælingini frá Cesc Fabregas og í 116. minutti fekk sent bóltin í málið og sparkað Spania upp á toppin, har spaniólar nú kunnu sita og sóla sær næstu fýra árini.

## Venjararnir aftaná

– Hetta er ein ógloymandi løta. Vit mugu ynskja kappingarneytum okkara tillukku, tí teir gjørdu tað torført fyri okkum. Finalan snúði seg um at leypa á, og bæði lið royndu at spæla spælið, sum tað eigur at spælast, segði spanski landsliðsvenjarin, Vicente del Bosque.

– Spælararnir eru sjálvandi sera glaðir, og hetta hava teir til fulnar uppiborið. Tað ber ikki til at seta orð á tað, tí kenslurnar kunnu ikki lýsast við orðum. Eg vil eisini takka sponsku fjeppparunum fyri teirra stóra stuðul, og teir eru minst líka fegnir sum spælararnir eru tað nú.

So fegin var sjálvandi ikki hollendski landsliðsvenjarin, Bert van Marwijk, tá hann skuldi gera sínar fyrstu viðmerkingar alment eftir finaluna:

– Vit eru knústir av úrslitinum, men sjálvt um vit vóru ein maður færri á vøllinum, mundu vit klárað at hildið tað, so vit fingu brotssparkskapping. Eg má viðganga, at betra liðið vann, men tað er altso hart at tapa eina HM-finalu. Spania skapti væl fleiri málkjansir enn vit, men høvdu vit brúkt okkara kjansir rætt, so rokni eg við, at vit høvdu staðið eftir sum heimsmeistarar, segði hann.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

FINALAN

**Holland - Spania** 0-1 (0-0) eftir umdyst

**0-1: Andrés Iniesta, 116.**
Dómari: Howard Webb, Ongland
Áskoðarar: 84.490 í Soccer City, Johannesburg

**Holland:** Maarten Stekelenburg – Gregory van der Wiel, John Heitinga, Joris Mathijsen, Giovanni van Bronckhorst (Edson Braafheid, 105.) – Mark van Bommel, Nigel de Jong (Rafael van der Vaart, 99.) – Arjen Robben, Wesley Sneijder, Dirk Kuyt (Eljero Elia, 71.) – Robin van Persie
***Gult kort:*** Gregory van der Wiel, Joris Mathijsen, John Heitinga, Arjen Robben, Nigel de Jong, Giovanni van Bronckhorst, Robin van Persie, Mark van Bommel
***Reytt kort:*** John Heitinga (tvey gul, 110.)
**Spania:** Iker Casillas – Sergio Ramos, Gerard Piqué, Carles Puyol, Joan Capdevila – Sergio Busquets, Xabi Alonso (Cesc Fàbregas, 87.) – Pedro Rodriguez (Jesús Navas, 60.), Xavi Hernandez, Andres Iniesta – David Villa (Fernando Torres, 106.)
***Gult kort:*** Joan Capdevila, Sergio Ramos, Carles Puyol, Andrés Iniesta, Xavi Hernandez

# Dómarin fekk av at vita

**HM 2010 Hollendsku spælararnir vóru í øðini inn á enska dómaran, Howard Webb, eftir HM-finaluna ímóti Spania, tí hann yvirsá eitt hornaspark til Holland, beint áðrenn Spania skoraði**

**Hilmar Jan Hansen**



– Vit góvu alt, sum vit áttu, men allíkavæl bar tað ikki á mál hjá okkum. Ein stór orsøk til tað var ein ótrúligur dómarafeilur, tí beint áðrenn spanska málið skuldu vit havt fingið hornaspark, segði Nigel de Jong.

Bara fimm minuttir fyri tíð tók Wesley Sneijder eitt fríspark, so bólturin rakti spanska verjumúrin og fór beint fram við málinum. Men í staðin fyri at døma hornaspark til Holland, dømdi dómarin málspark til Spania – og so kókaðu hollendingarnir.

Tað var ikki bara Nigel de Jong, ið vísti sína ónøgd aftaná, tí Dirk Kuyt segði seg vera púra samdan við liðfelagan:

– Vit blivu í øðini, tí vit vóru komnir so nær. Men vit høvdu kensluna av, at dómarin var meira í parti við spaniólum enn okkum, og at enda kostaði tað okkum møguleikan at vinna heimsmeistaraheitið, segði Kuyt.

Enski dómarin, Howard Webb, hevði annars munandi meira at gera, enn dómarar vanliga hava havt tað í einari HM-finalu, tí í teir tilsamans 120 minuttirnar, dysturin varði, gav hann ikki færri enn 14 gul kort og eitt reytt, og tað er nógv tað mesta nakrantíð í einari HM-finalu.

*hilmarjan@sosialurin.fo*